IDEALIR OG VERULEIKI

– viðmerking til Maritu Petersen og Árna Olafsson

Reaktiónirnar í kjalarvørnum á grein míni um heimastýrisskipanina, hava beint orðaskiftið av leið. Purasta og fullkomiliga.

Her er leiðarin á Oljutilsitingini, Martin Heinesen, undantikin. Hann hevur sakliga svarað nøkrum spurningum almemt. Men Árni Olafsson hevur nú í tveimum umførum lagt meg undir at geva skeivar upplýsingar og bera ósannindi fram. Tað sama hevur fyrrverandi løgmaður Marita Petersen gjørt.

Hóast eg longu havi svarað Árna Olafssoni einaferð, skal eg gera eina seinastu roynd at slaa fast, hvat mínar greinir hava snúð seg um og grundgeva fyri mínum útleggingum og niðurstøðum.

Hetta kenni eg meg noyddan til, tí ístaðin fyri eitt orðaskifti hava vit fingið ein orðadrátt, har annar tosar í eystur og hin svarar í vestur. Marita og Árni tosa um nakað heilt annað enn tað, sum eg havi viðgjørt. Og síðani brúka tey sínar egnu misskiljingar til at leggja meg undir at siga ósatt.

Harvið fara tey út um øll mørk fyri sømiligheit.

Hetta kann í prinsippinum sammetast við, at ein hondboltspælari hevði lopið inn í ein fótbóltsdyst, tikið bóltin við hondini og síðani lagt hinar undir at snyta, tí teir ikki fylgdu hondbóltsreglunum.

Hesin búsæti framferðarhátt ur gerst serliga løgin, um vit samanbera greinirnar hjá Maritu og Árna. Tey mótsiga jú hvørjum øðrum í sínum sonevndu „rættleiðingum".

Marita Petersen sigur til dømis, at eg sigi ósatt um, at Árni Olafsson starvast sum danskur embætismaður. Árni sjálvur váttar hinvegin, at hann er í starvi sum danskur embætismaður, men er fyribils fríttikin frá sínum vanligu uppgávum í danska Uttanríkismálaráðnum. Hvør hevur so sagt ósatt?

Kjarnin í málinum

Fyritreytirnar fyri einum og hvørjum dialogi eru rættiliga einfaldar. Vit mugu semjast um, hvat evni vit tosa um, og duga at síggja tingini frá øðrum síðum enn okkara egnu. Tá-staðni kunnu vit viðgera ósemjur sakliga.

Ongin av hesum fyritreytum er til staðar í skrivingini hjá Maritu og Árna um undirgrundarmálið.

Kjarnin í mínum greinum hevur verið at viðgera tað *realpolitisku gongdina* – altso tað sum veruliga fer fram og tey áhugamál, sum eru uppá spæl, tá avgerðir verða tiknar. Marita og Árni viðgera bert tað, sum stendur á pappírinum, tá alt er líðugt.

Formelt og reelt

Høvuðstátturin í míni viðgerð er munurin millum *formelt* og *reelt* vald í heimastýrisskipanini. Eg havi víst á, at tey idealir sum standa á pappírinum um sjálvræði og ábyrgd innan Heimastýrislógina, hava onki við veruleikan at gera. Dømini eru óteljandi, men bankamálið og undirgrundarmálið eru tey feskastu dømini um, at tær veruligu avgerðirnar verða tiknar til fyrimuns fyri tann sterkasta – í mótstríð við tær *formellu* ordningarnar. Heimastýrislógin verður tí ikki brúkt sum eitt amboð at regulera, skipa og seta mørk, men til at legitimera tilvildarligar avgerðir hjá tí *reella* valdinum.

Hetta gerst serliga sjónskt, tá vit viðgera sonevndar „interessukonfliktir" millum ríkispartarnar.

Interessukonfliktir

Síðani havi eg gjørt ta niðurstøðu, at skulu vit fáa greiði á viðurskiftunum, mugu vit brúka tær veruligu royndir vit hava fingið undir Heimastýrisskipanini. Vit mugu staðfesta hvørjir teir ítøkiligu trupulleikarnir eru, og tryggja okkum rættarligar karmar fyri, hvat ber til og ikki. Vit mugu fáa eitt ávíst samband millum tað *formella* valdið og tað *reella* valdið.

Hetta er eisini kjarnin í míni viðgerð av undirgrundarmálinum. Hetta er dømi um eitt økí við ítøkiligum interessukonfliktum millum ríkispartarnar. Men vit hava ongi umsitingarlig amboð, sum kunnu viðgera hesar konfliktir. Ístaðin hava vit latið umsitingina av málinum uppí hendurnar á eini Oljuráðleggingarnevnd við bæði donskum og føroyskum embætismonnum.

Hóast vit *formelt* hava yvirtikið alla politiska ábyrgd og umsiting av undirgrundini, verða tær *reellu* avgerðirnar viðgjørdar í einum umsitingarligum høpi, sum eftir mínum tykki ikki tryggjar greiðan skilnað millum donsk og føroysk áhugamál.

Henda niðurstøða er bygd á ítøkiligar erfaringar.

Tær ítøkiligu royndirnar

Árni og Marita gerast firtin tá eg nevni teir prinsipiellu trupulleikarnar, sum kunnu stinga seg upp, tá danskir og føroyskir embætismenn skulu samstarva í Oljuráðleggingarnevndini. Til tað er bert at siga, at hetta er ein *reellur* og royndur trupulleiki, uttan mun til um landsstýrið *formelt* hevur sett nevndina. Eg skal bert vísa á nøkur fá dømi um samstarv millum danskar og føroyskar embætismenn, har føroysk áhugamál eru dottin burturímillum, hóast landsstýrið er uppdragsgevari.

Fiskingargrunnurin frá 1992 sum ikki formelt, men *reelt* hevur havt vald til at ganga beint ímóti løgtingi og landsstýri.

Bygnaðarnevndin, sum *reelt* fekk kvotuskipanina ígjøgnum – Fyrrverandi forstjórin í Tinganesi, Finn Norman Christensen, sum hevði sera ilt við at grundgeva sínar umsitingarligu avgerðir út frá føroyskum áhugamálum.

Trupulleikin er ikki at danskir embætismenn eru lunskir. Trupulleikin er, at embætismenn sjálvsagt skulu fylgja signalum frá politikarum í sínum metingum. Og har vinnur tað sterkasta politiska systemið, um ósemjur eru. Serliga tá føroyskir politikarar als ikki eru samdir um, hvørji signal skulu sendast.

At fortreingja realitetirnar

Eg eri fegin um onnur vilja leggja aðrar metingar fram og grundgeva fyri teimum.

Tað gera Árni Olafsson og Marita Petersen tíverri ikki. Tey viðgera slett ikki hetta evnið. Ístaðin siga tey bara: Trupulleikin er ikki til – evnið er ikki til – so hesin maðurin sigur ósatt. Uttan nakra grundgeving, men við absoluttum útsøgnum. Vit vita hvat sannleikin og tann rætta læran er. Ferdugt.

Árni Olafsson og Marita Petersen vilja bert tosa um ta *formellu gongdina*. Tey vilja als ikki viðgera, hvat fer fram handan leiktjøldini, tá politiskar avtalur verða gjørdar. Tey vilja ikki viðgera interessukonfliktir og góðtaka ikki metingar av tí *reellu gongdini*. Tey vísa bert til tað formella. Lógir, frágreiðingar og niðurskrivaðar avtalur. Og skíra síðani alt annað ósannindi.

Prinsipielt er tað skakandi. Taka vit tað í álvara, mugu allir samfelagsspurningar og alt politiskt kjak leggjast burtur. Tað svarar til, at danskir politikarar og embætismenn skíra alla viðgerð av arbeiðsloysinum ósannindi. Tað stendur jú í Grundlógini at øll hava rætt til arbeiði.

Seta vit tað so banalt upp, er tað neyvan hetta Marita og Árni vilja forsvara. Tí má finnast ein onnur orsøk til, at tey eru so ídin at fortreingja realitetirnar.

At verja egnan leiklut

Skulu vit hava eitt orðaskifti mugu vit eisini spæla við opnum kortum. Í hesum føri eru bæði Marita og Árni sjálvi partar í politisku og umsitingarligu avgerðargongdini. Marita og Árni hava altso ein persónligan áhuga í teirra útlegging av málinum. Tað skulu tey sanniliga eisini hava loyvi til.

Men tað er eitt púra misvísandi grundarlag fyri at gera seg til sannleiksdómara vegna almenningin og krøva allar aðrar metingar. Tað ber sum kunnugt ikki til, at vera bæði dómari og vitni í eini sak. Og tað er púra burturvið, tá vit viðgera flókin politisk mál. Tey áttu at gjørt sær og øðrum greitt, at tey bert eru ein lítil partur í eini størri avgerðargongd, sum sjálvsagt má viðgerast frá øðrum sjónarhornum enn teirra egna.

Kanningar vantast

Hóast Marita og Árni ikki góðtaka evnið í mínum greinum, hirpast tey ikki við at slaa fast, at eg havi ikki kannað málið til lítar. Ein áhugaverdur logiskur kortsluttningur.

Eg kann ugga tey við, at eg havi lisið frágreiðingarnar frá oljuráðleggingarnevndini, undirgrundaravtaluna og annars tað mesta av tí almenna tilfarinum um undirgrundarmálið. Men við allari virðing fyri hesum arbeiði, so hevur tað ikki stóran týdning í hesum føri. Tað kann í hesum føri siga nakað um, hvat nakrir myndugleikar halda um eitt mál, tá avgerðirnar longu eru tiknar. Tað vil siga tann formella versiónin.

Tað sum eg viðgeri, er *hvussu og hví* avgerðirnar verða tiknar og tá fløktu kabalina av áhugamálum, sum hava týdning. Og tað krevur heilt aðrar kanningar.

Við bert at vísa til tær formellu avtalurnar, vilja Marita og Árni eggja mær til at gera sum maðurin, ið misti eina fimmkrónu millum trø og greinar í myrkri. Hann fann sær ein lyktapela og leitaði har sum ljóst var.

Hesi ráð kann eg tíverri ikki brúka. Eg noyðist hinvegin at finna eina lummalykt og leita millum trø og greinar.

Í hesum sambandi kann eg upplýsa, at eg í góð trý ár havi gjørt eitt miðvíst kanningararbeiði um tá politisku og umsitingarligu avgerðargongdina millum ríkispartarnar. Tað tilfar eg higartil havi sæð úr donskum ministerium rugvar meira enn 100-falt so nógv sum tað føroyska tilfarið. Tað ið er skrivað um føroysku undirgrundina eigur sín part av rúgvuni úr fleiri donskum ministerium – og tað er væl at merkja skrivað *eftir* des. '92, tá føroyingar formelt yvirtóku málsøkið.

Eg skal ikki lasta Maritu og Árna fyri ikki at hava gjørt sítt kanningararbeiði til lítar. Eg eri fúsur at svara spurningum, um tey venda sær til mín, og eg arbeiði støðugt við kanningunum.

Rætt og skeivt

Marita Petersen sigur í síni grein, at eg havi givið skeivar upplýsingar um hvør bygdi Oljutilsitingina upp og hvussu hon virkar. Hon sigur, at tað var landsstýrið sum setti allar limirnar í Oljuráðleggingarnevndina og at tað var landsstýrið sum setti Oljutilsitingina á stovn. Ja, sjálvsagt gjørdi landsstýrið tað – *formelt*. Men eg viðgjørdi spurningin um, hvussu hesar avgerðir vórðu tiknar *reelt*. Komu uppskotini um, hvør skuldi setast í Oljuráðleggingarnevndina bara sum reinar opinberingar hjá landsstýrinum? Hevur Oljuráðleggingarnevndin ikki *reelt* gingið á odda í øllum avgerðum, hóast hon *formelt* var niðurløgd millum '93 og '94? Hvussu var leiðarin á Oljutilsitingini settur? Hvør ráðgav landsstýrinum tá? Hvussu hevur landsstýrið umsitingarliga viðgjørt oljumál og hvørji ítøkilig tiltøk eru gjørd í Tinganesi til at handfara oljumál?

At siga fyri almenninginum, at føroyskir politikarar eru teir veruligu høvuðsaktørarnir í øllum, sum fer fram, er antin ein ógvuliga væl barberað útgáva av sannleikanum – ella er tað heimsmet í fortreinging.

Marita sigur seg vilja kjakast um Heimastýrislógina. Men hvat vil hon kjakast um, tá hon ikki vil viðgera tær royndir og teir trupulleikar vit hava fingið undir hesi skipan? Um hon vil kjakast um Heimastýrislógina í sjálvum sær, uttan atlit til tann veruleika lógin hevur virkað í, so verður tað jú reinur teoretiskur hugtaksfimleikur. Og so kunnu vit eins væl kjakast um Charles Prinsur sveik Dianu. Satt at siga, hevði eg hildið tað verið meira áhugavert.

Idealir og veruleiki

Tað er onki eindømi, at føroyskt samfelagsorðaskifti fer soleiðis av leið. Eg skal enda við at gera nakrar persónligar metingar um hví hetta er so.

Høvuðsorsøkin er eftir mínum tykki ein samanvevjing millum idealir og veruleika, sum elvir til tað vit kunnu kalla „orienteringsloysi".

Um vit skulu skapa nakað nýtt og semjast um politiskar avgerðir mugu vit hava ein greiðan skilnað millum idealir og veruleika.

Vit mugu analysera tær royndir vit hava gjørt okkum og gera okkum greitt, hvørjar kreftir stýra samfelagsgongdini. Hettar er *veruleikin*, sum vit kunnu síggja uppá fleiri mátar, og tískil kjakast um. Síðani kunnu vit skipa royndirnar og seta ynskir fram, um hvussu vit vildu *ynskt* okkum at samfelagið varð skipað. Hetta eru *idealini*, sum vit sjálvsagt eisini skulu kjakast um, og síðani royna at nærkast við politiskum avgerðum og skipanum.

Eftir svarunum hjá bæði Árna Olafssyni og Maritu Petersen at døma, umboða tey í hesum máli júst tann øvugta hugsunarháttin. Tey halda seg bert í nøkur føgur ideal, sum eru orðað í Heimastýrislógini, í undirgrundaravtaluni ella í frágreiðingum hjá stovnum ið skulu verja sínar egnu avgerðir. Síðani seta tey líkheitstekn millum hesi idealini og veruleikan. Tey tosa ikki um, hvussu tingini síggja út í veruleikanum. Tey tosa um, hvussu *tey* vilja, at tingini síggja út, og fornokta, at tað kann vera í stríð við veruleikan.

Koma vit ikki burturúr hesum, sita vit at enda eftir við ongari veruleikakenslu og við ongum idealum, tí bæði verða uppløyst í hvørjum øðrum. Úrslitið er ein verð uttan mál og mið.

Og tá er sjálvsagt onki at kjakast um.

Høgni Hoydal